

*Kórið Sólarmagn í Riolunato*

# Tá Tú alfagra land mítt rungaði í Pavarotti høll í Modena

**Vinalag og blíðskapur í Modena landslutinum í Italia skaptu heimligar karmar fyri einari ógloymandi kórferð hjá Kórinum Sólarmagni fyrr í ár.**

UTTANLANDSFERÐ

*Turið Kjølbro og John Dalsgarð*

Seint í august mánaði í 1982 trillar ein ungur italiumaður á motorsúkklu inn á ferjuleguna í Scrabster í Norðurskotlandi. Við kaj í Scrabster liggur Smyril, sum ger klárt at taka ímóti ferðafólki til Føroyar. Í bíðiraðini kemur ungi italiumaðurin at standa nakað aftan fyri ein føroyskan bil; úr bilinum stígur ein ungur maður við stórum, eldreyðum hári. 'Soleiðis sær ein rættur føroyingur út,' hugsar ungi italiumaðurin fyri seg sjálvan, tá ið hann eygleiðir reyðhærda føroyingin. Teir koma í prát, og hetta verður byrjanin til ferðahug til Føroya og eitt varandi vinalag, ið mangur føroyingur og italiumaður hava notið væl av.

Ungi italiumaðurin er Gianfranco Contri. Í styttri og longri tíðarskeið hevur hesin lítilláta̲ði og fyrikomandi maðurin búð í Føroyum; og heima í landspartinum Emilia Romagna og heimbygdini Riolunato hevur hann við miklum blíðskapi tikið ímóti ferðaløgum úr Føroyum, stórum sum smáum. Eingin ivi er um, at Gianfranco telist millum størstu ambassadørar Føroyar eiga úti í heimi. Málhugaður, sum hann er, gjørdi hann fyrst ein føroyskanitalskan parlør til ferðafólk, og síðan eina føroyska-italska orðabók í 2004, sum hann sama ár varð heiðraður við M.A. Jacobsen bókmentavirðisløn.

## Úr Vágum til Bologna

27 ár seinni, ein góðveðursdag tíðliga í mai 2009, fara 27 kórsangarar úr bygdunum Kirkjubø og Velbastað við Kórinum Sólarmagni og Fróða Sandoy kórleiðara til Italia. Vit verða hjartaliga móttikin á flogvøllinum í Bologna. Gianfranco er saman við vinmanni sínum og føroyavininum Argo komin úr Modena við bussi eftir okkum. Franco, sum hann oftast verður nevndur, er ikki bara er vertur okkara henda túrin, men eisini fyriskipari og 'ørindasveinur' – saman við góðum vinfólki og kenningum kring um í landspartinum.

Í eitt gott ár hava fyrireikingarnar til túrin verið í gongd; drúgt samskifti hevur verið millum Gianfranco í Italiu og vinmann hansara í Føroyum, ið hann hitti á kajini í Scrabster á sinni, John Dalsgarð, sum er formaður í nevndini fyri Kórið Sólarmagn. Miðvíst hava vit valt at hava við okkum føroyskar sangir við nýggjum útsetingum, eftir nýtíðar føroysk tónaskøld umframt nøkur onnur norðurlendsk. Serliga er talan um løg og útsetingar eftir Bjarna Restorff, Paula í Sandagerði, Sunleif Rasmussen, Unn Patursson, Hera Eysturlíð og Kára Bæk. Hesi løg, fingu vit at ásanna, vóru heilt ólík teimum løgum, ið italsku kórvertirnir framførdu fyri okkum. Og tað var ikki sørt av forvitni og áhuga, ið víst vóru hesum føroysku tónasmiðum.

## Úr Bologna til Nonantola

Longu fyrsta kvøldið, vit eru í Italia, skulu vit hava fyrstu konsertina. Hon er í søguliga býnum Nonantola, skamt eystan fyri Modena, har vit skulu gista ta fyrstu náttina. Sólin sær, tá ið vit koma út úr komuhøllini á flogvøllinum, og lýðkan er fjálg og mild.

Í Nonantola verða vit móttikin við opnum ørmum av fólki, ið eru knýtt at einari miðstøð fyri pensjónistar. Her tekur Irne ímóti okkum, tá ið vit koma við bussinum úr Bologna. Irne syngur við í Corale Rossini í Modena. Vit fáa at eta, breyð við osti og pylsu, og frískligt lambrusco vín afturvið. Konsert skal vera um kvøldið, so hildið verður aftur við tí váta slagnum. Tað skilja italsku vertir okkara einki av. Syngja og ikki drekka vín? Tey standa spyrjandi.

Konsertin er í einari samkomuhøll, ið er bygd upp í hetta sama heim fyri pensjónistar. Vit framføra saman við fýra øðrum kórum, millum øðrum Corale Rossini Giovane, sum er tey ungu í Corale Rossini, og Coro Di Redé, sum er eitt staðbundið fólkatónleikakór. Vertirnir vita sum er, at vit hava ferðast langa leið allan dagin, og teir vilja ikki pína okkum heilt, áðrenn túrurin hjá okkum í Italia er byrjaður. Men so mikið meira verður gjørt burturúr tí rungandi eftirgildinum, ið verður fyriskipað í forstovuni fyri øllum teimum luttakandi kórunum. Har fáa vit høvi at hoyra forkunnuga italska sangframførslu; vit svara aftur við at tríva í eitt av teimum lættaru kvæðunum, ið vit so dánt hava lært okkum, áðrenn vit fóru heimanífrá.

## Úr Nonantola til Modena

Tað er við spenningi, vit fara spákandi eftir kringlutu gøtunum í Modena, av gistingarhúsinum til Pavarotti-leikhúsið annan dagin á ferðini. Ikki er sørt av virðingarótta á fólki, tá ið vit stíga inn á hetta kenda leikhúsið í heimbýi Pavarotti. At fólk í býnum eru errin av at hava fostrað ein so mætan sangara, er skiljandi; vit fáa eina kenslu av, at Pavarotti, hóast hann hevur ferðast á øllum heimsins størstu pallum og telist millum bestu tenorar nakrantíð, var ein maður, ið hevði stóran alsk til heimstað sítt og íbúgvarnar har.

Leikhúsið, sum er frá 1838, æt upprunaliga Teatro Comunale di Modena. Í 2007, beint eftir at Pavarotti var deyður, varð navnið á leikhúsinum broytt til Teatro Comunale Luciano Pavarotti. Vit eru so heppin at hoyra operasangara undir venjing saman við